# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Føðingardagshald í Kelduni

Seinasta leygardag var føðingardagshald í Kelduni í Skálafirði. Tað var Sámal Bláhamar, búsitandi í Havn, sum helt sín 60 ára føðingardag har.

Ein føst skrá var løgd fyri føðingardagshaldið, talur vórðu hildnar og farið var heilt aftur til 1700-talið í bæði móðir- og faðirætt hjá Sámali.

Mathias Lassen úr Vági, búsitandi í Hvalba, segði frá um ættarbondunum hjá Sámali til ein av manningini á hálendska skipinum Westerbeek, sum í 1742 rendi á land vestan til á Suðuroynni. Mathias Lassen skrivar í løtuni eina bók um Wetersbeek, sum kemur út í heyst. Freydis Poulsen, fyrrverandi lærari í Klaksvík, greiddi frá um ættina hjá Sámali í faðirætt. Hon byrjaði við Jóhannesi Poulsen (Jóhannes tann Vísi) sum varð borin í heim 15. september 1776. Eisini sang Martin Joensen, sum er vestmenningur eins og Sámal, og Hávardur Jensen úr Kvívík sang sálmar, meðan Hans Pauli Højgaard spældi undir.

Sámal er vestmenningur, sum hevur búð í Havn størsta partin av sínum lívi. Hann er kanska best kendur sum dekksølumaður og sum virkin í føroysku ferðavinnuni.


*Sámal Bláhamar*

*Myndir: Regin Bláhamar og Árni Conradsson*


*Tórharda og Sámal Bláhamar*


*Preben Jack Petersen blaðstjóri á ferðavinnublaðnum Travel People*


*Hávardur Jensen syngur sálmar*


*John B. Hansen frá Smyril Line og Petur Martin Petersen frá Kunningarstovuni í Fuglafirði*


*Martin Joensen spælir undir, meðan abbabørn syngja*


*Abbadótturin Eva sang og spældi guittara*


*Mathias Lassen segði frá søguni um hálendska skipið Westerbeek*